# Strandarlond samdust um makrelveiði


Tað hevur gingið væl hjá føroysku nótaskipunum á makrelveiði í heyst, og prísirnir hava verið góðir

Mynd: Vilmund Jacobsen

**- Semjan um makrelin er eitt dømi um, at við samstarvi millum strandarlondini ber til at skipa fiskiskapin á ein lívfrøðiliga forsvarligan hátt. Tað er hetta, sum í longdini tænir øllum pørtum, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø**


*Landsstýrismaðurin fegnast um, at strandarlondini á fundinum í Føroyum komu ásamt um eina avtalu um makrelin*

Mynd: Vilmund Jacobsen

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Strandarlondini, ES, Føroyar og Noreg, gjørdu á fundi í Havn, 25.- 26. november semju um fiskiskapin eftir makreli í 2006.

Heildarkvotan í 2006 er sett til 442.000 tons, og samanborið við semjuna fyri 2005 er kvotan hækkað við fimm prosentum.

Føroyska makrelkvotan í 2006 er soleiðis 20.450 tons.

### Samsvarandi ICES

Fiskimálaráðið sigur, at partarnir hava síðani 1999 gjørt semju um ein veiðisetning fyri umsiting av makrelstovninum og eitt kvotabýti.

- Fyrsta strandarlandaavtalan varð gjørd fyri 2000, og við undantaki av 2003 hava avtalur verið gjørdar á hvørjum ári síðani.

Víst verður á, at ásetingin av heildarkvotuni fyri 2006 er gjørd samsvarandi veiðisetninginum hjá strandarlondunum og eftir tilmælinum frá ICES, sum í seinastu ráðgevingini sigur, at ein heildarkvota millum 373.000 tons og 487.000 tons er innan fyri lívfrøðiliga tryggar karmar.

### Altjóða sjógvur

Ein partur av heildarkvotuni av makreli er settur av til altjóða sjógv.

- Hetta verður viðgjørt á ársfundinum hjá NEAFC í november.

Fiskimálaráðið vísir á, at ES, Føroyar og Noreg eru samd um at halda fram og betra eftirlitið við fiskiskapinum eftir makreli, herundir landingum, útblaking og vantandi veiðifráboðanum.

- Londini eru eisini samd um at menna vísindaliga samstarvið í sambandi við kanningar av makrelstovninum, sigur Fiskimálaráðið.

### Bjørn fegnast

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, fegnast um, at tað eydnaðist londunum at koma ásamt um eina avtalu um makrelin.

- Semjan um makrelin er eitt dømi um, at við samstarvi millum strandarlondini ber til at skipa fiskiskapin á ein lívfrøðiliga forsvarligan hátt. Tað er hetta, sum í longdini tænir øllum pørtum, leggur landsstýrismaðurin dent á.

---

ICES:

# Eingin lodnuveiða í Barentshavinum í vár

**Lodnustovnurin í Barentshavinum er illa fyri. Tískil verður mælt til, at eingin veiða verður loyvd komandi vár, sigur ráðgevandi nevndin hjá ICES**



FISKASTOVNAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í døgunum, 6.–13. oktober 2005, var fundur í ráðgevandi nevndini (ACFM) hjá ICES, og føroyska umboðið á fundinum var Jákup Reinert, fiskifrøðingur.

Í stuttum lýsir hann stovnsmetingarnar og ráðgevingina.

- Eingir serføroyskir stovnar vóru á skránni, men eitt nú felagsstovnar og ferðandi stovnar sum t.d. kongafiskur í Irmingarhavinum, svartkjaftur, norðhavssild, makrelur og rossamakrelur. Nógvir aðrir fiskastovnar vórðu viðgjørdir á fundinum.

ACFM sigur soleiðis um nakrar av fiskaastovnunum:

Trantkongafiskur í Irmingarhavinum og har um leiðir: Av praktiskum orsøkum velur ICES at viðgera allan uppsjóvar trantkongafisk í økinum sum eina eind, til tað vísindaliga er staðfest, hvussu stovnsuppbýtið í veruleikanum er. Mælt verður til, at veiðan í 2006 ikki fer upp um miðalveiðina í 1989-1992, t.e. minni enn 41.000 tons. Tveir bólkar av uppsjóvar trantkongafiski eru í Irmingarhavinum og har um leiðir, og mælt verður til, at hvørgin teirra verður troyttur lutfalsliga meira enn hin.

Svartkjaftur: Hóast metingarnar av stovni og veiðitrýsti eru óvissar, er tó vist, at gýtingarstovnurin er væl fyri, men veiðutrýstið er alt ov stórt. Mælt verður til at halda seg til verandi veiðisetning svarandi til eina veiði í 2006 upp á minni enn 1.5 miljónir tons, og at tiltøk verða sett í verk fyri at verja yngul og annan óbúnan fisk.

Norðhavssild: Stovnurin er væl fyri, og veiðitrýstið hóskandi. Verandi veiðiavtala eigur at halda fram svarandi til eina veiði í 2006 upp á 732.000 tons.

Makrelur: Fyri suður-, vestur- og orðsjóvarstovnin undir einum (NEA makrelurin) verður mælt til at halda seg til avtaluna um veiðisetning. Hetta vil hava við sær eina veiði í 2006 upp á millum 373.000 og 487.000 tons.

Rossamakrelur: Mælt verður til, at veiðan í 2006 av rossamakreli í øllum økinum (IIa, IIIa, IVa, Vb, VIa, VIIa-c, e-k og VIIa-e) verður hildin lægri enn 150.000 tons.

Lodna í Barentshavinum: Stovnurin er illa fyri. Verandi veiðiavtala millum Noreg og Rusland skal tryggja, at gýtingarstovnurin í gýtingartíðini (januar-apríl) alla tíðina er oman fyri Blim (200.000 tons). Framskrivingar vísa, at við ongari veiði verður gýtingarstovnurin bert eini 72.000 tons næsta ár. Tískil verður mælt til, at eingin veiða verður loyvd komandi vár.